FFG – Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 6. november 2025

fmr@fmr.fo

Hoyringsvar til uppskot til broytingar í Skattalógini v.m. – Mál. nr. 25/21617

Víst verður til teldupost tykkara 29. oktober 2025 við uppskoti til broytingar í Skattalógini (SL).

Nevndin í Felagnum Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur gjøgnumgingið uppskotið til broytingar í Skattalógini og hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

1) Broytingin til § 25, nr. 4 um fríar ágóðar, verður broytt frá at skatta "faktiska nýtslu" til at skatta "ræðisrættin til" føstu ognina og/ella leysafæið o. a. Broytingin reisir nakrar ivaspurningar s. s.

   a) Hvør skal skattast tá tað eru fleiri eigarar, ella fleiri stjórar ella stjóri og nevnd?
   b) Hvussu skal ræðisrætturin ásetast?
   c) Hvør ásetur virði á ræðisrættinum?
   d) Verður ræðisrætturin skattaður fyri inntøkuárið 2025 ella frá 1. januar 2026?

2) Mælt verður til, at nágreina ivaspurningarnar vístir á omanfyri á hóskandi hátt.

Annars ongar viðmerkingar.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við FFG.

Vinarlig heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG)

Alvi S. S. Nielsen	Fróði Sivertsen	Olaf Frits Joensen	Jóhannes Færø
skrivari	formaður	næstformaður	peningarøkil